# *Vælkomin í Løgtingið*

- ***ein praktisk vegleiðing***

Ólavsøka 2009

Umsiting Tingsins

Tinghúsvegur 1

100 Tórshavn

Telefon 363900, Telefax 363901

Teldupostur: logting@logting.fo

Heimasíða: www.logting.fo

# Vælkomin

Bóklingurin vælkomin í Løgtingið var fyrstu ferð gjørdur eftir løgtingsvalið í januar 2008, og er framvegis ætlanin at geva hann út hvørja ferð, eitt nýtt ting tekur við.
Tað er tó soleiðis, at rættiliga nógvar broytingar eru hendar hetta góða hálvtannað árið, og hava vit tí gjørt av at gera eina uppdateraða útgávu, sum tó bert verður til taks á heimasíðuni.

.

Eyðvitað eru ikki øll viðurskifti umrødd í bóklinginum, men vit hava roynt at fáa sum mest við av tí, sum vit í samstarvinum og dagliga samskiftinum við tingmenn meta hevur týdning. Í hesi útgávuni eru skjøl við nøkrum reglum og mannaagongdum, sum tingmenn ofta hava brúk fyri, linkað til tekstin.

Tingfólk eru vælkomin at venda sær til umsitingina við uppskotum um broytingar og nýggjum hugskotum.

Á Løgtingi, 29. juli 2009
Súsanna Danielsen
stjóri

# Innihald

**Tinghúsbygningurin – praktisk viðurskifti** **bls. 6**

Bygningar
Flokshøli og klivar
Matarhøllin
Fjølmiðlarúm
Lyklar
Pappírsgarderoba
Hátalarar og skermar
Gong-gong
Parkering
Telduskipan
Ymiskt

**Skipanarlig viðurskifti** **bls. 9**

Formansskapur Løgtingsins
Løgtingsformaðurin
Umsiting tingsins
Flokkarnir á tingi

**Tingfundir** **bls. 11**

Fundartíðir og dagsskrá
Fundarskipan
Sætiskipan
Atkvøðugreiðsla v.m.
Fartelefonir

**Tingarbeiðið** **bls. 13**

Ting- og nevndarviðgerð av løgtingslógaruppskoti
Uppskot til ríkislógartilmæli
Uppskot til samtyktar
Frágreiðingar og fyrispurningar
Misálit
Talutíðir
Uppskot hjá tingmonnum
Broytingaruppskot til 2. og 3. viðgerð

**Nevndararbeiðið** bls. 18

Fastar nevndir
Aðrar nevndir
Skipan av nevndunum og nevndarformaðurin
Fundartíðir og dagsskrá
Nevndarskrivarar
Nevndarrøklar
Nevndarmappur
Farloyvi og varamenn
Nevndarferðir
Millumtjóða samstarv

**Løgtingið og almenningurin** bls. 22

Heimasíða
Tingvarp
Løgtingstíðindi
Alment innlit
Rundvísing

**Hendingar og freistir í tingárinum** bls. 24

**Lønarviðurskifti tingmanna** bls. 25

Løn
Formanslønir
Kostnaðarendurgjald
Eftirløn
Bíðiløn
Leggja álitisstørv frá sær
Farloyvi úr borgarligum starvi
Farloyvi úr tinginum
Farloyvi í sambandi við barnsburð og ættleiðing
Ferðing innan- og uttanlands í løgtingsørindum

**Telefonlisti** bls. 28

# Tinghúsbygningurin – praktisk viðurskifti

**Bygningar**

Løgtingið húsast á Tinghúsvegi 1-3, hereftir nevndur Tinghúsbygningurin, har er tingsalurin, umsiting tingsins, matarhøll, flokshølir og klivar. Á "Gamla apoteki", hava flokkarnir flokshøli og floksskrivstovu.

**Flokshøli og klivar**

Í Tinghúsbygninginum hevur hvør tingflokkur sítt høli og eitt felags fundarhøli. Í flokshølunum eru 2 teldur, í teimum smáu 1 telda, printari og telefon.

7 smáar skrivstovur, nevndar klivar, eru í kjallarahæddini til tingmenn. Í klivunum eru telda og telefon. Felags printari er í forrúminum, har eisini møguleiki er at sita og arbeiða við farteldu. Møguleiki er fyri at seta upp kaffimaskinu v.m., so møguleiki verður at fáa sær ein kaffimunn

Á Gamla apoteki hava flokkarnir skrivstovu m.a. til floksskrivaran og fundarhøli. Smáu flokkararnir hava bert eitt høli.

**Matarhøllin**

Tá ting- og nevndarfundir eru, fæst kaffi, te og vatn ókeypis í matarhøllini. Til keyps fæst morgunmatur, t.e rundstykki við osti og/ella súltutoy, frukt, ymist góðgæti, og sum oftast okkurt slag av køku og suppa.

Døgurði fæst frá kl. 12.00 til 14.00 teir dagar, tingfundir eru. Matarseðil verður hongdur upp í matarhøllini fyri eina viku í senn.

Tikið verður bert ímóti reiðum peningi.

Atgongd til matarhøllina hava tingmenn og starvsfólk tingsins. Tingmenn kunnu í avmarkaðan mun bjóða gesti inn í matarhøllina, men hava ábyrgd av, at fólk fer útaftur saman við tí tingmanni, sum hevur bjóðað viðkomandi inn við. Fjølmiðlafólk og serligir áhugabólkar, sum koma í tingið, tá ávís mál eru til viðgerðar, hava ikki atgongd til matarhøllina.

Tað er ikki loyvt at eta ella at taka kaffi, te ella annað drekkandi við sær inn í tingsalin.

## Fjølmiðlarúm

Fjølmiðlarnir og tingskrivararnir hava framíhjárætt at nýta rúmið framm fyri matarhøllini – fjølmiðlarnir til teirra virksemi og tingskrivararnir til pappírsgoymslu.

## Lyklar

Atgongd til flestu høli á Tinghúsvegnum eru við elektroniskari lyklaskipan, meðan atgongd til Gamla apotek og flokshøli eru við systemlykli.

Elektroniski lykilin fæst bæði sum kort (format sum kredittkort) og sum brikkur at hanga í lyklaringin. Elektroniski lykilin kann nýtast til úthurðar, t.e. høvuðsdyrnar við Tinghúsvegin, tingmannainngondina vestanfyri, inngongdina í norðara enda og tey økið innandura, har almenningurin ikki hevur beinleiðis atgongd.

Systemlykilin passar til úthurðina á Gamla apoteki og til øll flokshølini.

Lyklarnir verða útflýggjaðir móti undirskrift frá móttakara. Um lykilin verður burtur fæst nýggjur móti at gjalda kr. 100,- í depositum, sum verður endurgoldið, tá tingmaður fer frá. Verður elektroniski lykilin burturmistur er umráðandi at boða umsitingini frá hesum, so hann kann gerast óvirkin og ikki kann brúkast av óviðkomandi persónum.

## Pappírsgarderoba

Í kjallaranum við tingmannainngongdina hevur hvør tingmaður skáp, har postur til tingmenn, tilfar, sum umsitingin býtir út til tingmenn, so sum løgtingslógaruppskot v.m., verður lagt í.

Í gongini við tingbólkahøli hevur hvør tingmaður skáp, sum kann læsast, at goyma tilfar í. Tingmenn fáa lykil til skápið útflýggjaðan.

## Hátalarar og skermar

Hátalarar eru í øllum hølum tingsins, har orðaskifti úr salinum hoyrist. Í matarhøllini, roykirúminum og lobbyøkinum á 2. hædd eru sjónvarpskermar, har skiftast kann millum sjónvarpið, mynd úr tingsalinum og røðaralistan. Í tingmannagarderobuni og í forrúminum til klivarnar (bæði í kjallaranum) eru skermar, har fylgjast kann við hvat fyriferst í salinum.

## Gong-gong

Tá tingfundurin byrjar, og tá atkvøðast skal, verður ringt, og hoyrist tað gjøgnum hátalaraskipanina, treytað av at hátalarin er frá.

## Parkering

Løgtingið hevur eingi parkeringspláss. Tó eru 3 stór parkeringsøki í nánd, har bilar kunnu standa allan dagin uttan gjald, tey eru Skálatrøð, Glasheyggur og parkeringsøkið við Jóannes Paturssonargøtu/Niels Wintersgøtu.

## Telduskipan

Allir tingmenn hava atgongd til telduskipan tingsins, og hava allir tingmenn brúkaranavn og loyniorð. Nýggir tingmenn fáa útflýggjað brúkaranavn, teldupostadressu og loyniorð fyrsta tingdagin saman við vegleiðing um, hvussu loggað verður á fyrstu ferð.
Tráðleyst net er tøkt í øllum bygninginum. Vegleiðing fæst frá Umsitingini um, hvussu slepst inn á netið. Tingmenn og starvsfólk hava atgongd til alt datakervið, meðan onnur t.d fjølmiðlar kunnu fáa atgongd til heimasíðuna.

Teldupostur kann lesast um internetið við at logga inn á **http//post.vk.fo** og síðan brúkaranavn og loyniorð.

Mælt verður tingmonnum til at brúka hesa teldupostadressu í øllum samskifti, sum hevur við tingarbeiðið at gera. Hetta tí at fundarboð o.a.m. verður sent á hesa adressuna.

Eisini er møguligt at koma inn á datakervi tingsins uttan mun til, hvar ein er staddur. Um tingmaður ynskir at nýta henda møguleika, fæst vegleiðing við at venda sær til umsitingina.

## Ymiskt

*Ævisøgur*
Stutt ævisøga (CV) fyri allar tingmenn verður lagt á heimasíðu tingsins saman við mynd av tingmanninum. Nýggir tingmenn fáa oyðublað sendandi í telduposti at fylla út og senda aftur. Broytingar skulu fráboðast umsitingini. Um tingmaður ikki hevur hóskandi mynd skipar tingið fyri myndatøku.

*Visitkort*
Tingið útvegar øllum tingmonnum visitkort. Oyðublað verður útflýggjað til at savna inn upplýsingar. Kortið verður klárt á ólavsøku.

# Skipanarlig viðurskifti

## Formansskapur Løgtingsins

Løgtingið velur løgtingsformann og tríggjar næstformenn, sum mynda formansskapin. Formansskapurin er hitt hægra fyriskipaða stýrið í Løgtinginum og umboðar tingið úteftir. Formansskapurin skal tryggja, at umsitingin virkar væl og tíðarhóskandi í allar mátar.

Formansskapurin hevur fund eftir tørvi og viðger ítøkilig mál, sum sambært tingskipanini skulu leggjast fyri formansskapin, mál av grundregluligum týdningi og/ella stórum týdningi, og mál, sum annars skulu verða viðgjørd eitt nú lønarviðurskifti hjá tingmonnum, spurningin um at taka óárinið frá løgtingsmanni v.m.

Stjórin er skrivari hjá formansskapinum.

## Løgtingsformaðurin

Formaðurin ansar eftir, at arbeiði Løgtingsins verður væl fyriskipað og úr hondum greitt. Hann stýrir umrøðum Løgtingsins og ansar eftir, at alt er í góðum skili, og at viðgerðin er virðilig. Formaðurin hevur skrivstovu og fundarhøli (4) á 2. hædd, og eitt av skrivstovufólkunum í umsitingini starvast m.a. sum skrivari hjá løgtingsformanninum.

## Umsiting tingsins

Uppgávurnar hjá umsiting tingsins eru lýstar í tingskipanini.

Við ábyrgd mótvegis løgtingsformanninum eru uppgávurnar í stuttum:

- At vera skrivari í tinginum og í nevndum tingsins.
- At vera løgfrøðiligur rágevi hjá formansskapi, flokkunum og tingmonnum.
- At ansa eftir at tingmál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt.
- At taka sær av rakstrar- og tænastuuppgávum tingsins.

Umsitingin húsast á 3. hædd í Tinghúsbygninginum. Í umsitingini starvast 14 starvsfólk, stjóri, 3 nevndarskrivarar, 6 skrivstovufólk av teimum eru 3 tingskrivarar, ein húsavørður og 3, sum arbeiða í matarhøllini og við reingerð.

## Flokkarnir á tingi

Flokkarnir skipa seg vanliga við einum floksformanni á tingi. Floksformaðurin er sambindingarlið millum flokkin og løgtingsformannin, soleiðis at skilja, at um formaðurin ynskir t.d. at broyta mannagongdir, so verður hetta gjørt eftir samráð við floksformenninar á tingi og um tingmaður ella flokkur ynskir broyting ella hevur eitthvørt at finnast at, eigur hetta at verða fráboðað umvegis floksformannin.

Hvør flokkur hevur floksskrivstovu og ein ella fleiri floksskrivarar. Flokkurin fær játtan til hetta arbeiðið eftir stødd av flokkum sambært reglugerð hesum viðvíkjandi, Reglugerðin sæst á heimasíðu Tingsins undir lóggávu.

| |
|---|
| *Meira kann lesast um skipanarligu viðurskiftini í kap. I í Tingskipanini* |

# Tingfundir

## Fundartíðir og dagsskrá

Løgtingsfundir eru vanliga týsdag, mikudag, hósdag og fríggjadag kl. 11.00 Tá stór mál og/ella nógv mál eru á skránni, byrjar fundur ofta kl. 9.30 .

Løgtingsformaðurin boðar vanliga frá fundi, tá løgtingsfundur endar og boðar samstundis frá skránni. Fundirnir verða herumframt lýstir á heimasíðuni undir dagsskrá. Miðað verður eftir, at vegleiðandi skrá fyri tingfundir er tøk fyri komandi 14 dagarnar.

Løgtingsfundir og nevndarfundir eru vanliga ikki sunnu- og halgidagar (ólavsøkudagur undantikin) og yrkadagar eftir kl. 22, uttan so at serligar umstøður gera tað neyðugt.

## Fundarskipan

Orðaskifti fer fram í tingsalinum. Tingsins røðarapallur er tann fríasti í landinum við tað, at tingmenn ikki kunnu krevjast til svars uttantings fyri tað, teir siga innatings, uttan samtykki Løgtingsins. Við øðrum orðum skal tingið samtykkja, um tað skuldi komið fyri, at onkur kennir seg ærumeiddan og ynskir at fara í rættin við málinum. Eitt slíkt frælsi ber eina ábyrgd við sær, og í tingskipanini eru tí ásettar reglur fyri málburðinum í tinginum. Tað er tingformaðurin, sum hevur eftirlit við, at tingmenn vanda sær um orðini, og tingmaður skal geva seg undir avgerð formansins. Formaðurin kann undir ávísum umstøðum taka orðið frá tingmanni.

Orðaskifti fer sum nevnt fram innan teir karmar, sum tingskipanin ásetir. Reglur eru fyri talutíðum til ymsu viðgerðarhættirnar og –stigini, eins og reglur eru um, at tingmenn skulu málbera seg høviliga og halda tillutaðu talutíðina. Friður eigur at vera í salinum, meðan fundur er, og viðmælis- og mótmælissiður er ósiður á tingi.

Tingmenn tala vanliga bert av røðarapallinum ella eftir formansins avgerð úr sessinum í tingsalinum. Tingmaður vendir altíð sína røðu til formannin og ikki til ein einstakan tingmann ella landsstýrismann. Verður tingmaður ella landsstýrismaður nevndur í røðu, eigur hann at verða nevndur bæði við fornavni og eftirnavni. Løgmaður eigur at verða nevndur løgmaður. Endurgevast kann bert av tingsins røðarapalli við loyvi frá formanninum.

## Sætiskipan

Í tingsalinum sita løgmaður og landsstýrismenninir á fremstu røð, og frá aðru røð og aftureftir hava flokkarnir sess eftir floksstødd.

### Atkvøðugreiðsla v.m.

Atkvøðugreiðsla á Løgtingi er á telduskipan. Løgtingsmenn atkvøða antin fyri, atkvøða ímóti, ella atkvøða ikki. Telduskipanin skrásetir, hvussu hvør einstakur hevur atkvøtt í einstøku málunum. Á hvørjum borði er ein atkvøðuboks, sum nýtt verður at atkvøða við. Á bróstinum í tingsalinum eru skermar, sum vísa, hvussu atkvøtt verður.

Sama boks verður nýtt, tá ið tingamaður biður um orðið ella viðmerking. Undir orðaskiftunum vísa skermarnir røðaralistan. Talutíðin verður stýrd av telduskipanini, og á røðarapallinum er ur, sum vísir talutíðina.

Í boksini eru eisini hátalari og oyrasnigil. Oyrasnigilin eigur ikki at verða tikin út úr tingsalinum.

### Fartelefonir

**Fartelefonir eiga at vera sløktar á ting- og nevndarfundum**. Royndir vísa, at hetta kann vera trupult at halda. Tí verða tingmenn mintir á at seta telefonina á ljóðleyst. Um telefonin ringir, tá tingmaður er á røðarapallinum, hoyrist hetta í hátalara og tingvarpinum.

*Meira kann lesast um fundarskipan og atkvøðugreiðslur í kap. IV og V í tingskipanini*

# Tingarbeiðið

Tingið arbeiðir eftir reglum, sum eru ásettar í stýrisskipanarlógini og tingskipanini.

Tað eru 5 sløg av løgtingsmálum:

- Uppskot til løgtingslóg
- Uppskot til ríkislógartilmæli
- Uppskot til samtyktar
- Frágreiðingar, skrivligir, munnligir, ófráboðaðir fyrispurningar og skrivligir spurningar (§ 52 a spurningar)
- Misálit á løgmann ella landsstýrismenn

Tað eru bara løgmaður, landsstýrismaður ella løgtingsmaður, sum kunnu byrja mál í Løgtinginum.

Niðanfyri verður viðgerðin av einum løgtingslógaruppskoti í stuttum lýst.

## Ting- og nevndarviðgerð av løgtingslógarupspkoti

*Framløga*

Tá løgmaður, landsstýrismaður ella tingmaður hevur lagt lógaruppskot fram, velja tingbólkarnir vanliga til 1. viðgerð eitt framsøgufólk at viðgera málið vegna flokkin. Øll uppskot verða býtt út til tingmenn sama dag, sum tey verða framløgd, saman við møguligum hoyringssvarum v.m., sum hoyra til uppskotið. Uppskotini verða annaðhvørt løgd í skápini í kjallaranum við tingmannainngongdina ella á borðið hjá tingmanninum í tingsalinum.

Eitt lógaruppskot skal hava 3. viðgerðir, og millum 1. og 2. viðgerð verður tað vanliga viðgjørt í einari av tingnevndunum. Eitt lógaruppskot verður vanliga ikki sett á skrá fyrr enn eina viku eftir, at tað er lagt fram.

*1. viðgerð*

1. viðgerð byrjar við, at framsøgufólkini fáa orðið at viðgera málið vegna flokkin. Framsøgufólkini fáa orðið eftir floksstødd. Til ber hjá einum tingmanni úr hvørjum flokki at gera viðmerkingar til framsøgufólkini. Síðani kunnu aðrir tingmenn fáa orðið. Uppskotssetarin fær orðið eftir framsøgumenninar. Tá 1. viðgerð er liðug, beinir løgtingsformaðurin vanliga málið til viðgerð í eini av tingnevndunum.

*Nevndarviðgerð*

Undir nevndarviðgerðini verður málið viðgjørt nærri, nevndin kann útvega fleiri upplýsingar frá viðkomandi almennum ella privatum, eins og fólk kunnu verða boðsend á fund við nevndina at siga sína hugsan um uppskotið. Landsstýrismaðurin, sum hevur lagt uppskotið fram, verður vanliga boðsendur á fund við nevndina um málið. Koma skriv til nevndina, sum viðvíkja málinum (nevndarskjøl), syrgir skrivarin fyri, at nevndarlimirnir fáa tey. Áðrenn uppskotið kann fara til 2. viðgerð, skrivar nevndin álit í málinum. Álitið er ein samandráttur av arbeiðinum í nevndini við uppskotinum, einstøku nevndarlimirnir gera møguligar viðmerkingar til málið og koma við sínum tilmæli um, hvørja støðu teir halda, at Løgtingið skal hava í málinum, og seta fram møgulig broytingaruppskot.

*2. viðgerð*

Tá nevndin hevur lagt álitið fram, verður málið sett á skránna til tingfund. 2. viðgerð av málinum er vanliga eina viku eftir, at nevndin hevur lagt álitið fram. Áðrenn orðaskiftið byrjar, kann tingmaður seta broytingaruppskot fram. Nevndin, meiriluti ella minniluti í nevndini kann seta broytingaruppskot fram, eftir at 2. viðgerð er byrjað. Eru broytingaruppskot til lógaruppskotið, verður atkvøtt um tey. Ymiskt er, hvussu drúgt orðaskiftið er við 2. viðgerð. Tekur ein samd nevnd undir við málinum, kann orðaskiftið vera stutt, men er nevndin ósamd um innihaldið í uppskotinum, kann umrøðan gerast drúgv. Tá orðaskiftið er liðugt, verður atkvøtt um møgulig broytingaruppskot og upprunauppskotið.

*3. viðgerð*

Tá 2. viðgerð er liðug, fer málið vanliga uttan nevndarviðgerð til 3. viðgerð, sum verður sett á skránna fyri tingfund nakrar dagar seinni. 4 tingmenn kunnu í felag skrivliga seta fram broytingaruppskot til 3. viðgerð. Hetta skal vera gjørt, áðrenn orðaskiftið byrjar. Við 3. viðgerð verður fyrst atkvøtt um møgulig broytingaruppskot og síðani soleiðis broytta uppskotið. Løgtingið kann bæði við 2. og 3. viðgerð samtykkja at beina málið aftur í nevnd.

*Avgreiðsla av tingmáli – staðfesting og kunngerð*

Tá Løgtingið hevur samtykt eitt lógaruppskot, samanskrivar umsitingin endaliga uppskotið, og síðani sendir løgtingsformaðurin løgmanni uppskotið. Løgmaður staðfestir lógaruppskotið sum løgtingslóg og kunnger tað í Kunngerðablaðnum.

## Uppskot til ríkislógartilmæli

Uppskot til ríkislógartilmæli verða viðgjørd á sama hátt sum uppskot til løgtingslógir. Einasti munur er, at endaliga úrslitið verður ikki kunngjørt alment, men fráboðað ríkismyndugleikunum av løgmanni. Tað samtykta uppskotið er ikki bindandi fyri borgaran, men eitt óbindandi tilmæli til ríkismyndugleikarnar um at seta eina lóg í gildi í Føroyum.

## Uppskot til samtyktar

Hesi mál verða viðgjørd sum uppskot til løgtingslógir. Tó enda hesi mál eftir atkvøðugreiðsluna við 2. viðgerð og skulu ikki staðfestast og kunngerast av løgmanni. Uppskot til samtyktar eru ikki løgfrøðiliga bindandi. Í onkrum føri krevst tó, at ein tingsamtykt skal til, fyri at landsstýrið t.d. kann gera sáttmálar við onnur lond.

## Frágreiðingar og fyrispurningar

*Frágreiðingar*
Løgmaður leggur fram ólavsøkufrágreiðing ólavsøkudag, og landsstýrismenn kunnu eisini leggja fyri tingið frágreiðing til umrøðu. Málið verður umrøtt, men eingin niðurstøða verður gjørd, og atkvøtt verður ikki í málinum.

*Munnligir fyrispurningar*
Tingmenn hava regluliga høvi at seta løgmanni ella landsstýrismonnum munnligar fyrispurningar, har setast kunnu stutt og nágreiniliga orðaðir fyrispurningar um almenn viðurskifti.

Tingmenn kunnu eisini seta nevndarformanni fyrispurning um, hvussu gongst at viðgera ávíst mál, sum er beint nevndini til viðgerðar, men sum einki álit er latið í enn.

Hóast heitið munnligir fyrispurningar, so skal spurningurin orðast skrivliga og sendast umsiting tingsins á logting@logting.fo dagin fyri innan kl. 10.00. Leiðreglur fyri munnligar fyrispurningar eru á heimasíðuni. Linkur

*Ófraboðaðir fyrispurningar*
Tingmenn hava regluliga høvi at seta løgmanni ella landsstýrismonnum ófráboðaðar fyrispurningar. Setast kunnu tá spurningar, sum tann spurdi ikki kennir frammanundan, og sum skal svarast beinanvegin. Tá ófráboðaðir fyrispurningar eru á skrá, spyr løgtingsformaðurin við fundarbyrjan, um nakar ynskir at seta ófráboðaðan fyrispurning.

Ófraboðaðir fyrispurningar vara í mesta lagi 1 tíma, og hvør spurningur má í mesta lagi vara 10 minuttir. Formaðurin ger av í hvørjari raðfylgju, spurningarnir verða settir.
Í árskalendaranum fyri tingseta, sum er at finna á heimasíðuni, sæst, nær *munnligir fyrispurningar og ófráboðaðir spurningar* eru á dagsskrá.

*Skrivligir spurningar (§ 52 a spurningar)*
Tingmenn kunnu frá ólavsøku til jóansøku seta løgmanni og landsstýrismonnum stuttar skrivligar spurningar, ið ikki eru settir á annan hátt. Spurningurin verður latin formanninum umvegis Umsiting tingsins, sum síðan sendir hann til avvarðandi landsstýrsimann. Svarast skal í seinasta lagi 10 yrkadagar eftir, at spurningurin er innlatin.
Spurningur og svar verða løgd á heimasíðuni.
Spurningar kunnu ikki setast eftir at val er skrivað út ella landsstýrið hevur lagt frá sær.
http://www.logting.fo/files/File/2008/Vegleiding%20gr%2052a%20fyrispurningar.pdf

*Skrivligir fyrispurningar*
Ynskir tingmaður drúgvari umrøðu av einum almennum máli, ella heldur tingmaður seg ikki kunna halda seg innan karmarnar fyri munnligar fyrispurningar, kann hann seta løgmanni, landsstýrismanni og ríkisumboðsmanninum ein skrivliga orðaðan spurning.

Fyrispurningurin skal sendast umsiting tingsins á logting@logting.fo. Formaðurin sigur tinginum frá fyrispurninginum á sama ella næsta fundi. Vanliga samtykkir tingið uttan atkvøðugreiðslu, at fyrispurningurin skal svarast.

## Misálit

Mál um misálit verða bert viðgjørd á einum løgtingsfundi. Uppskot um misálit á løgmann ella landsstýrismenn kann leggjast fram av løgtingsmanni. Skráin verður tá alt fyri eitt broytt soleiðis, at hetta mál verður sett á skránna at vera næsta mál á fundinum. Atkvøtt verður, tá umrøðan endar.

## Talutíðir

Tingskipanin ásetir neyvar reglur um, alt eftir hvat slag av málið er til viðgerðar, hvussu leingi og hvussu ofta tingmenn kunnu hava orðið og gera viðmerkingar, herundir raðfylgjuna, tingmenn kunnu fáa orðið í.

## Uppskot frá tingmonnum

Landsstýrið leggur vanliga fram meirilutan av uppskotunum, men tingmenn kunnu eisini leggja fram lógaruppskot v.m. Nevndarskrivararnir hava m.a. sum uppgávu at hjálpa og ráðgeva tingmonnum í sambandi við, at hesir ætla at leggja fram uppskot til løgtingslóg, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar.

Mannagongdin í slíkum føri er, at tingmaðurin skrivar almennar viðmerkingar til uppskotið, har greitt verður frá, hvør ætlanin er við uppskotinum, meðan skrivarin tekur sær av tí løgfrøðiliga partinum, t.e. at evna til tekniska partin av uppskotinum, skriva serligar viðmerkingar til einstøku greinarnar v.m. Formlig krøv til innihaldið í viðmerkingunum eru ásett í tingskipanini. Farið verður vanliga ikki undir at evna uppskotið til, fyrr enn tingmaðurin hevur skrivað almennu viðmerkingarnar. Tingmaður kann sjálvsagt venda sær til nevndarskrivaran, bæði áðrenn og meðan almennu viðmerkingarnar verða skrivaðar at søkja sær upplýsingar, løgfrøðiliga ráðgeving v.m. Tingmaðurin eigur at venda sær til skrivaran í teirri nevndini, sum fær uppskotið til viðgerðar.

Tá uppskotið er endaliga orðað, eftirkannar og kopierar umsitingin uppskotið og fær tað í tingsalin til framløgu. Uppskot kunnu leggjast fram 3. dagin eftir, at endaliga uppskotið er formanninum í hendi, t.v.s. innkomið til umsitingina.

### Broytingaruppskot til 2. ella 3. viðgerð

Um tingmenn ætla at seta fram broytingaruppskot til 2. ella 3. viðgerð, verður mælt tingmonnum til at seta seg í samband við nevndarskrivaran í rímiligari tíð, áðrenn tingviðgerðin byrjar, so broytingaruppskot eru klár at leggja fram, áðrenn orðaskiftið byrjar.

*Meira kann lesast um tingarbeiðið í kap III í tingskipanini*

# Nevndararbeiðið

## Fastar tingnevndir

Á øðrum tingfundi eftir val er nevndarval á skránni. Valið fer fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum sbrt. løgtingsvallógini eftir floksstødd ella í valbólkum. Flokkarnir gera av innanhýsis, hvørji skulu veljast í tær ymisku nevndirnar.

Løgtingið hevur 7 fastar nevndir, og í hvørja skulu veljast 7 limir og 7 varalimir, undantikið í Landsstýrismálanevndina, sum hevur 3 limir. Tær 7 nevndirnar eru Fíggjarnevndin, Uttanlandsnevndin, Landsstýrismálanevndin, Vinnunevndin, Trivnaðarnevndin, Mentanarnevndin og Rættarnevndin.

Løgtingsnevndirnar kunnu bara viðgera mál, sum av formanninum eru beind nevndini til viðgerðar. Tó kunnu nevndirnar, um í minsta lagi 5 limir ynskja tað, seta løgmanni ella landsstýrismanni spurningar um ávís viðurskifti. Hetta verður nevnt samráð. http://www.logting.fo/files/File/2008/Reglur%20um%20samrad.pdf
Serligar reglur eru harumframt um Landsstýrismálanevndina, Uttanlandsnevndina og Fíggjarnevndina.

Vanliga er samsvar ímillum viðgerðina í nevndunum og ta viðgerð, eitt mál hevur fingið í miðfyrisitingini, t.d. viðger Vinnunevndin løgtingsmál, sum snúgva seg um málsøkið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, og sum eru viðgjørd í Vinnumálaráðnum, og Mentanarnevndin tey mál, sum hoyra til málsøkið hjá landsstýrismanninum í mentamálum o.s.fr.

## Aðrar nevndir

Løgtingið kann seta aðrar nevndir at geva Løgtinginum tilmæli í ávísum málum, vanliga kallaðar § 25-nevndir. Serligar reglur eru um framferðarháttin í sambandi við setan av § 25-nevndum.

Løgtingið velur herumframt limir í Norðurlandaráðið, Útnorðurráðið, Lokalnevndina, nevningagrundlistanevndirnar, nevndina, sum hevur eftirlit við varðhaldsfangum, eins og Løgtingið velur løgtingsgrannskoðarar. Meira kann lesast um nevndirnar á heimasíðuni.

## Skipan av nevndini og nevndarformaðurin

Fyrst valdi nevndarlimurin kallar inn til fyrsta fundin innan 3 løgtingsfundardagar eftir, at nevndin er vald, har nevndin velur formann og næstformann eftir lutafalsvalháttinum sbrt. løgtingsvallógini.

Nevndarformaðurin boðar nevndarlimunum til fundar, stýrir nevndarfundunum og stílar fyri, at álit verður skrivað. Tað áliggur formanninum at gera nevndararbeiðið skjótast gjørligt. Hevur formaðurin forfall, røkir næstformaðurin uppgávur formansins.

### Fundartíðir og dagsskrá

Nevndirnar hava fastan fundardag og -tíð. Vikuætlan verður løgd á heimasíðuna hjá Løgtinginum, tá nevndirnar eru valdar. Fundarhølini (1-3) eru á 2. hædd.

Nýggjur fundur verður fráboðaður við GlobiSMS á fartelefon og við telduposti til teldupostadressu tingmansins á @logting.fo og til floksskrivstovuna, kunngjørdur á heimasíðuni, eins og uppslag er sett fram í móttøkuni í forhøllini.

Nevndarlimir fáa fundarboð í seinasta lagi 18 tímar áðrenn, fundurin skal vera, eins og skráin fyri fundin verður send limunum og gjørd almenn. Eru allir nevndarlimirnir samdir um tað, kann tað undir serliga átrokandi umstøðum víkjast frá tíðarfreistini.

Við atliti til bæði nevndarlimir og tey, ið verða boðsend á fund við nevndirnar, verður miðað eftir at gera ætlan fyri nevndararbeiðið í góðari tíð og so langt fram sum gjørligt.

### Nevndarskrivarar

Hvør nevnd hevur ein skrivara, sum hevur sum uppgávu at ráðgeva og hjálpa nevndini í sambandi við viðgerðina av løgtingsmálum v.m. Skrivararnir eru starvsettir í umsiting tingsins og eru útbúnir løgfrøðingar ella hava aðra hægri útbúgving. Allir skrivararnir eru skrivarar í fleiri nevndum.

Av ítøkiligum uppgávum hjá nevndarskrivarunum kunnu nevnast at skriva uppskot til álit, tilevna broytingaruppskot til løgtingsmál, leggja ætlan fyri nevndararbeiðið saman við formanninum, finna fram tilfar og upplýsingar til nevndina v.m. Skrivarin arbeiðir fyri allar limirnar í nevndini.

### Nevndarrøklar

Hvør nevnd hevur ein nevndarrøkil, sum hjálpir nevndarskrivaranum við fyrireikingunum til nevndarfundir, tekur sær av nevndarskjølum og hevur ábyrgdina av nevndarmappum. Harumframt er nevndarrøkilin kontaktpersónur hjá nevndini, tá nevndarskrivarin ikki er tøkur.

## Nevndarmappur

Allir nevndarlimir hava eina nevndarmappu til taks á nevndarfundum, sum er til at nýta á fundunum. Í hesa mappu verða sett tey løgtingsmál, sum nevndin hevur til viðgerðar, og øll skjøl, sum koma nevndini í hendi undir nevndarviðgerðini (nevndarskjøl). Dagsskrá og gerðabók frá seinasta fundi, eru eisini í mappuni. Nevndarrøkilin hevur ábyrgd av, at tilfarið í mappuni er dagført, og umsitingin hevur mappurnar í varðveitslu.

## Farloyvi og varamenn

Um nevndarlimur ikki fær møtt á fundi, og hann ynskir, at varalimur skal møta, áliggur tað honum at siga varaliminum frá og fáa honum møguligt tilfar til fundin.

Fer tingmaður í farloyvi, tekur *varamaðurin*, sum fær sæti á tingi fyri tingmannin, við teimum nevndarsessum, sum tingmaðurin hevur sæti í. Serligar reglur galda fyri Uttanlandsnevndina og Landsstýrismálanevndina. Har tekur varamaðurin í nevndini, *varalimurin,* sæti í nevndini.

Nevndarfundir eru ikki almennir, men løgtingsmaður, sum ikki er limur í nevndunum, kann møta sum eygleiðari á fundum í hesum nevndum. Hann kann tó ikki taka orðið á fundunum. Serligar reglur galda fyri Uttanlands- og Landsstýrismálanevndina.

## Nevndarferðir

Møguleiki er hjá nevndunum at kunna seg við viðurskifti, sum viðvíkja arbeiðsøkinum hjá nevndini, herímillum at ferðast uttanlands annaðhvørt ár í hesum sambandi. Ferðin verður løgd til rættis í samráð við umsitingina og skal góðkennast av løgtingsformanninum, samsvarandi serligari mannagongd í reglugerð, ið er galdandi fyri nevndarferðir. http://www.logting.fo/files/File/2008/Karmar%20fyri%20nevndarferdir.pdf

## Millumtjóða samstarv

*Norðurlandaráðið*

Løgtingið velur tveir limir og tveir varalimir í Norðurlandaráðið, og verða hesir valdir, tá ið løgtingsval hevur verið og annars við byrjanina av hvørjari løgtingssetu. Valið fer fram eftir lutfalstali.

Norðurlandaráðið er skipað í fýra politiskar bólkar. Konservativi bólkurin, har Fólkaflokkurin er, Miðbólkurin, har Sambandsflokkurin, Sjálvstýris-

flokkurin og Miðflokkurin eru, Sosialdemokratiski bólkurin, har Javnaðarflokkurin er, og Vinstrasosialistiski bólkurin, har Tjóðveldi er. Herumframt eru eisini nakrir limir, sum eru uttan fyri bólkarnar.

*Útnorðurráðið*

Útnorðurráðið er skipað við 6 tingmonnum úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Løgtingið velur eftir hvørt løgtingsval 6 limir og 6 varalimir í føroysku sendinevndina. Hesir eru valdir fyri alt valskeiðið. Sendinevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.

*Meira kann lesast um nevndararbeiðið í kap II í tingskipanini, um Norðurlandaráðið í løgtingslóg nr. 33 frá 26. juni 1973 og á www.norden.org og um Útnorðurráðið á www.vestnordisk.is*

## Millumtjóða samstarv

*Norðurlandaráðið*

Løgtingið velur tveir limir og tveir varalimir í Norðurlandaráðið, og verða hesir valdir, tá ið løgtingsval hevur verið og annars við byrjanina av hvørjari løgtingssetu. Valið fer fram eftir lutfalstali.

Norðurlandaráðið er skipað í fýra politiskar bólkar. Konservativi bólkurin, har Fólkaflokkurin er, Miðbólkurin, har Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin eru, Sosialdemokratiski bólkurin, har Javnaðarflokkurin er, og Vinstrasosialistiski bólkurin, har Tjóðveldi er. Herumframt eru eisini nakrir limir, sum eru uttan fyri bólkarnar.

*Útnorðurráðið*

Útnorðurráðið er skipað við 6 tingmonnum úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Løgtingið velur eftir hvørt løgtingsval 6 limir og 6 varalimir í føroysku sendinevndina. Hesir eru valdir fyri alt valskeiðið. Sendinevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.

*Meira kann lesast um nevndararbeiðið í kap II í tingskipanini, um Norðurlandaráðið í løgtingslóg nr. 33 frá 26. juni 1973 og á www.norden.org og um Útnorðurráðið á www.vestnordisk.is*

# Løgtingið og almenningurin

Løgtingsfundir eru almennir, og almenningurin skal, uttan at møta á tingfundi, kunna fylgja við øllum umrøðum á almennum løgtingsfundum.

## Heimasíða www.logting.fo

Øll løgtingsmál verða løgd á heimasíðuna hjá Løgtinginum, tá tey eru løgd fram, eins og frágreiðingar, skrivligir fyrispurningar v.m. Gerðabøkur hjá løgtingsnevndunum og tinginum, atkvøðuyvirlit og innkomin skriv til tingið eru eisini tøk á heimasíðuni, eins og nevndarskjøl, so skjótt tey eru flýggjað nevndarlimunum. Møguleiki er at lurta eftir orðaskiftinum í tingsalinum um internetið.

## Tingvarp

Sjónvarpið sendir frá viðgerðini í Løgtinginum, tá løgtingsfundir eru, um ikki annað er á skránni í Sjónvarpinum.

## Løgtingstíðindi

Í Løgtingstíðindum verða prentað øll løgtingsmál, nevndarálit, løgmansrøðan og aðrar frágreiðingar frá landsstýrismonnum, skrivligir fyrispurningar v.m. Løgtingstíðindi koma út í árligari bók.

## Alment innlit

Brøv o.a. frá landsstýrismanni, landsumsiting, øðrum almennum myndugleikum og privatum felagsskapum eru almenn, um ikki tey eru merkt "í trúnaði". Serligar reglur eru fyri skjøl til Uttanlands- og Landsstýrismálanevndina. Øll lønarviðurskifti hjá tingmonnum eru almenn, t.e. løn, aðrar samsýningar, endurgjald fyri ferðautreiðslur v.m. Skjøl, sum viðvíkja umsitingini, verða viðgjørd eftir reglunum í fyrisitingarlógini og í lógini um alment innlit.

## Rundvísing

Bólkar og einstaklingar ynskja javnan at síggja tingið og fáa frágreiðing um tað og arbeiði tess. Slíkar rundvísingar eru eftir fastari skipan. Rundvísingin fæst í lag við at venda sær til umsitingina, sum síðan vísir fram tingsalin og greiðir frá.

Um tingmenn vilja vísa tingið fram, eigur umsitingin at verða kunnað um hetta frammanundan. Sagt eigur at vera frá, hvussu nógv fólk tað snýr seg um, og nær rundvísingin er. Um hon er, meðan tingfundir ella nevndarfundir eru, má fyrilit takast fyri hesum. Er rundvísingin eftir arbeiðstíð hevur tann, sum skipar fyri, ábyrgdina av, at allar hurðar eru stongdar, tá farið verður.

Rundvísingar fata ikki um formansskrivstovuna, 3. hædd og økið hjá flokkunum, uttan serlig avtala er gjørd um hetta.

# Hendingar og freistir í tingárinum

Árskalendari fyri tingsetuna liggur á www.logting.fo undir dagsskrá.

Av hendingum og freistum í árinum kunnu nevnast:

***Løgtingið verður sett*** ólavsøkudag kl. 13.00. Undan hesum fer skrúðgonga úr tinginum í dómkirkjuna, har guðstænasta verður hildin, og síðan aftur í tingið, har tingið verður sett. Á hesum fundi heldur løgmaður ólavsøkurøðuna, har hann viðger støðuna í samfelagnum og ætlanirnar hjá landsstýrinum. Tingið umrøður løgmansrøðuna í fyrstu viku í august. Tingsetan endar ólavsøkudag árið eftir.

***Fiskidagarnir komandi árið*** verða ásettir við løgtingslóg í seinasta lagi 18. august sama árið, fiskiárið byrjar.

***Útnorðurráðið*** hevur vanliga ársfund síðst í august mánaði og evnisfund í juni mánaði. Formansskapurin heldur vanliga fund samstundis, sum árs- og evnisfundirnir eru, umframt um mánaðarskiftið januar/februar.

***Uppskot til løgtingsfíggjarlóg*** skal vera lagt fyri tingið innan 1. oktober á hvørjum árið og skal vera samtykt innan 31. desember.

***Norðurlandaráðið*** hevur ársfund seinast í oktober mánaði. Formansskapurin, nevndirnar og politisku bólkarnir hava vanliga eisini fund seinast í januar, apríl, juni og september mánaði.

Uppskot til løgtingslógir, sum skulu fáa gildi 1. januar, skulu ***leggjast fram innan 5. november***.

***Ungdómsting*** er annaðhvørt ár í februar. Komandi ungdómsting verður 11. og 12. februar 2008. Næmingar úr framhaldsdeild fólkaskúlans viðgera uppskot, sum tey sjálvi hava gjørt, og seta landsstýrismonnum munnligar fyrispurningar.

Uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, sum skulu verða liðugt viðgjørd fyri ólavøsku, skulu ***leggjast fram innan 8. mars***. Uppskot, sum ikki eru liðugt viðgjørd á ólavsøku, fella burtur og mugu leggjast fram av nýggjum, skulu tey hava viðgerð.

# Starvs- og lønarviðurskifti tingmanna

Reglurnar um løn, eftirløn og onnur starvsviðurskifti hjá tingmonnum eru ásettar í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

**Løn**

Løgtingsmenn verða løntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, t.e. lønarstig 47. Lønin verður goldin mánaðarliga frammanundan frá tí 1. í mánaðinum eftir, at valbrævið er góðkent, t.e. í hesum valskeiðið 1. mars 2008.

Lønin í lønarstigi 47 er í løtuni kr. 34.100,73 um mánaðin. Sum endurgjald fyri útreiðslur, sum standast av at vera tingmaður t.d. samskiftisútreiðslur fáa allir tingmenn eina skattafría viðbót sum er kr. 2000,- um mánaðin, og verður hon goldin út saman við lønini.

**Formanslønir**

Formenninir í tingnevndunum og næstformenninir í tinginum fáa eykaløn, sum er kr. 2.500,- um mánaðin. Um tingmaður røkir meir enn ein sess verður tó bert ein løn veitt.

**Kostnaðarendurgjald**

Tingmenn, sum ikki búgva í Tórshavn, Hoyvík ella á Hvítanesi fáa eitt kostnaðarendurgjald, sum skal "dekka" útreiðslur til ferðing heimanífrá og til Løgtingið og fyri útreiðslur til mat v.m. í Tórshavn. Ískoytið er ásett við støði í reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum um endurgjald fyri ferðing í arbeiðsørindum og reglunum um dag – og tímapening, og er upphæddin sett fyri 100 dagar um árið.

Endurgjaldið eftir reglunum um dag- og tímapening er:

| | |
|---|---|
| Tórshavn, Hoyvík og Hvítanes | 0 kr. |
| Suðuroy | 25.000 kr. árliga |
| Aðrastaðni | 15.000 kr. árliga. |

Ferðapeningur verður ásettur alt eftir, hvar tingmaðurin býr. Fyri koyring verður latið endurgjald fyri koyring í egnum bili eftir reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum. Upphæddin er kr. 3,20 fyri kilometurin aftur og fram 100 ferðir um árið.

Fyri ferðing sjóvegis og gjøgnum tunlar, har gjaldast skal, verður roknað við útgangsstøði í lægsta taksti fyri 100 ferð um árið.

Um tingmaður ikki møtir á tingfundi, verður drigið frá í kostnaðarendurgjaldinum við 1/100 parti. Frádrátturin verður gjørdur í sambandi við útgjaldið í juni.

### Eftirløn

Treyt fyri at fáa eftirløn er, at tingmaður hevur havt sæti á tingi í minst eitt ár. Um so er, forvinnur tingmaður sær eftirløn, sum 8 tey fyrstu árini er 4,5% av lønini hvørt árið og síðan 3% fyri hvørt árið næstu 8 árini til 60% av lønini, sum er hægsta eftirlønin.

Eftirlønin verður útgoldin, tá tingmaður fyllir 67 ár. Eftirlønin kann tó verða útgoldin frá tí, tingmaðurin er fyltur 60 treytað av, at aldurin hjá tingmanninum, tá hann leggur frá sær, saman við tíðini í tinginum faldað við 2 gevur 95 ár ella meira.

Um tingmaður doyr, fær hjúnafelagi 74 % av eftirlønini tingmaðurin hevði havt rætt til, og børn undir 21 ár fáa barnaeftirløn.

### Bíðiløn

Tá tingmaður fer frá, antin tí hann ikki verður valdur aftur ella vegna sjúku, fær hann bíðiløn í ein mánað fyri hvørt árið, hann hevur sitið á tingið, tó minst 4 mánaðir og í longsta lagi 6 mánaðir. Bíðilønin fatar ikki um skattafríu veitingarnar.

### Leggja álitisstørv frá sær

Stýrisskipanarlógin ásetir, at løgtingsmaður skal leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti av landsstýrinum, ella, sum landsstýrið hevur valt hann í. Hetta er tó ikki galdandi fyri beinleiðis fólkavald umboð, so sum býráðslimir v.m. Løgtingsmenn skriva eftir áheitan frá formanninum undir uppá, hvørji hesi álitisstørv eru, og at hann leggur tey frá sær.

### Farloyvi úr borgarligum starvi

Tingmenn, sum eru alment settir, hava krav uppá at fáa farloyvi úr starvi sínum fult ella partvís, meðan teir sita í tinginum. Somuleiðis kunnu teir, meðan teir eru tingmenn, í mesta lagi arbeiða ½ tíð. Umsitingin sendir skriv út við fyrispurningi um setanarbrøkin, sum síðani skal sendast aftur, váttaður av arbeiðsgevaranum.

## Farloyvi úr tinginum

Tingmaður kann søkja um farloyvi úr tinginum í styttri ela longri tíð. Farloyvi skal í minsta lagi vera eina viku. Hevur tingmaður farloyvi í sambandi við, at hann er burturstaddur í tingørindum ella fólkatingsørindum, hevur hann rætt til farloyvi við løn og ískoytum, hetta er eisini galdandi, um tingmaður er sjúkur og kann vátta hetta við læknaváttan.

## Farloyvi í sambandi við barnsburð og ættleiðing

♀Tingfólk hava rætt til farloyvi í sambandi við barnsburð og ættleiðing í 24 vikur við løn, men uttan ískoyti. ♂Tingfólk hava rætt til fráveru í 14 dagar uttan løn, men uttan miss í eftirlønaraldri. ♂Tingfólk hava tó rætt til løn frá barsilsskipanini í hesum tíðarskeiði.

## Ferðing innan- og uttanlands í løgtingsørindum

Endurgjald verður veitt eftir reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum um endurgjald fyri útreiðslur í sambandi við ferðing innan- og uttanlands. Farloyvi krevst frá umsitingini, áðrenn farið verður. Møguleiki er at fáa útgoldið ferðaforskot, t.e. ávís peningauphædd, har mett verður, hvørjar útreiðslur standast av ferðini. Ferðaseðilin verður goldin beinleiðis av tinginum. Ferðauppgerð skal latast umsitingini skjótast tilber eftir heimkomu og í mesta lagi 14 dagar aftaná. Vegleiðing um, hvussu mannagongdin er. http://www.logting.fo/files/File/2008/Ferding%20handbok.pdf

*Lesast kann um lønar- og starvsviðurskifti tingmanna í løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna og § 8 í stýrisskipanarlógini*

# Telefonlisti

Telefonnummarið hjá Løgtinginum er **363900.**
Um ringjast skal beinleiðis verður ringt 36 + lokalnr.

| **3. hædd** | Lokalnummar | Heimatelefon/flokshøli | Fartelefon |
|---|---|---|---|
| Fax | (36 )3901 | | |
| Súsanna Danielsen | -3905 | 31 17 85 | 21 17 85 |
| Jóhanna Arge | -3906 | | |
| Høgni Joensen | -3907 | | |
| Marius Rein | -3908 | | |
| Anni Joensen | -3909 | | |
| Beinta Isaksen | -3910 | | |
| Ásla Stenberg | -3911 | | |
| Thurid Debess | -3912 | | |
| Kristina Samuelsen | -3913 | | |
| Barbara Brattaberg | -3915 | | |
| **2. hædd** | | | |
| Løgtingsformaðurin | -3918 | | |
| Maria Bjørk | -3919 | | |
| Kopirúm fax | -3902 | | |
| Kopirúm | -3920 | | |
| Formansfundarhøli | -3921 | | |
| **1. hædd** | | | |
| Fundarhøli fax | -3903 | | |
| Tjóðveldi | -3922 | 31 24 95 | |
| Fólkaflokkurin | -3923 | 31 24 91 | |
| Javnaðarflokkurin | -3924 | 31 24 93 | |
| Sambandsflokkurin | -3925 | 31 24 92 | |
| Miðflokkurin | -3926 | 31 05 99 | |
| Sjálvstýrisflokkurin | -3927 | 31 24 94 | |
| Fjølmiðlarúm | -3928 | | |
| Forhøll og móttøka | -3929 – 3930 | | |
| **Kjallari** | | | |
| Klivi 1 - 7 | -3931 - 3937 | | |
| Felagsøkið | -3938 | | |
| Halgeir í Dali | -3940 | | 28 24 50 |